



## <u>Kunning í samband við útferð hjá 2. flokki tann 13. juni 2023</u>

So er tíðin komin til, at vit í 2. flokki á skúlanum við Løgmannabreyt fara okkara árligu floksútferð uttan fyri Havnina.

Týsdagin tann **13. juni 2023** fara vit til **Haldórsvíkar**. Vit fara avstað sama, hvussu veðrið er ☺

Vit **møta sum vanligt** í skúlanum kl. 8. Bussurin fer frá skúlanum við Løgmannabreyt kl. 8.15. Um tað er onkur, sum longu veit, at tað ikki liggur fyri at koma við nevnda dagin, vilja vit fegin fáa tað at vita sum skjótast, tí tað kann vera avgerðandi fyri, hvussu stóran buss vit skulu hava.

Í **Haldórsvík** fara vit at hugna okkum. Vit fara at ganga runt í bygdini, spæla í ánni, á sandinum, á spæliplássinum og á fótbólsvøllinum og annars spæla ymisk spøl. Vit hava møguleika at brúka wc'ini og stóra veitsluteltið hjá Víkar Camping, so vit kunnu vera undir taki, um veðrið ikki verður til vildar.

Av tí vit fara at hava ein langan dag, er tað umráðandi, at øll hava ein góðan og stóran **matpakka** við, umframt ein vatndunk.

Sum nevnt omanfyri so fara vit at spæla í ánni og á sandinum, tí er tað umráðandi at børnini av **skiftiklæðir og handklæði** við. Vit vilja mæla tykkum til at leggja skiftiklæðini í plastposar, so alt ikki verður vátt og skitið. Alt skal verða í einari tasku, sum tey sjálvi klára at bera.

Børnini eru vælkomin at taka glúpar, spannir og annað við, men tey hava sjálvi ábyrgd av tí.

Vit vera aftur á skúlanum á Løgmannabreyt umleið kl. **15.45.** Tá eru foreldrini vælkomin at **avheinta børnini** eftir ein langan og vónandi góðan og stuttligan dag.

Vit gleða okkum at fara ein øðrvísi túr við tykkara børnum.

Vinarliga

Toymið í 2. flokki

